## DAGSINS MEINING

# Tvær áminningar

Í seinastu viku fekk altjóða samfelagið tvær áminningar. Hesa var bæði altjóða AIDS dagur og altjóða dagur hjá rørslutarnaðum. Taka vit síðstnevnda evnið fyrst, so vórðu vit her Føroyum mint á, at enn er langt eftir á mál, tá tað ræður um at tryggja rørslutarnaðum góðar atkomumøguleikar í almenna rúminum. Allastaðni, har tann rørslutarnaði vendir sær, eru forðingar. Trappur og høgar gáttir, ongar lyftur, vánalig toalettviðurskifti og trupulleikar við almennum flutningsførum á sjógvi og landi. Í fleiri ár hevur verið funnist at hesum vánaligu viðurskiftum, men sama ger. Her hendir alt ov lítið. Her má nú henda nakað heilt skjótt, tí henda vána støðan er stór skomm fyri tær almennu Føroyar. Eisini vit her á blaðnum mugu taka í egnan barm. Tað er alt annað enn lætt hjá einum persóni í koyristóli at koma inn í Miðlahúsið. Vit fara tí í næstum at bøta um hetta, og vit vóna, at vit um ikki alt ov langa tíð kunnu fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Hin áminningin, sum heimurin fekk, snúi seg um eyðkvæmi ella AIDS, sum flestu fólk nú siga. Vánaliga støðan úti í heimi bara stendur við og versnar. Serstakliga í Afrika fyri sunnan Sahara er støðan heilt út av lagi vánalig. Milliónir eru smittað, 3 milliónir av børnum hava mist foreldrini. Eitt heilt ættarlið er um at hvørva. Her er ikki bert talan um ein ómetaligan menniskjansligan sorgarleik. Her er eisini talan um eina búskaparliga vanlukku. Tá tað mesta av einum ættarliði í arbeiðsførum aldri hvørvur, fær hetta ógvusligar fylgjur fyri framleiðsluna. Úrslitið er kreppa og hungur. Hartil kemur, at eingin er at uppala børnini tíansheldur at uppihalda børnunum. Sorgarleikurin er mestsum fullkomin.

Altjóðasamfelagið hevur higartil ikki megnað at hjálpt so mikið til, at sjúka er steðgað. Hetta er tó ikki bert t.d. ST fyri at lasta. Hetta hevur eisini nakað at gera við mentanarlig og politisk viðurskifti í Afrika. Stjórnirnar í harðast raktu londunum hava ikki viljað sæð veruleikan í eyguni. Tað er tískil alt ov lítið gjørt fyri at upplýsa um smittuvandar og um fyribyrging. Nú tykist tó, sum vend er komin í og serstakliga suðurafrikanska stjórnin er av álvara farin í hernað móti AIDS og HIV. Men vesturheimurin hevur eisini sína ábyrgd av sorgarleikinum. Fátæku londini høvdu ikki ráð at keypa heilivág og heilivágsfyritøkurnar vildu í fyrstu atløgu ikki loyva framleiðslu av bíligum kopiheilivági. Tað eydnaðist til endans ST at noyða risafyritøkurnar at loyva søluni av bíligum vælvirkandi heilivági til menningarlondini. Hetta hendi bara so seint, at skaðin var hendur í hvussu so er í Afrika. Nú eru tó glottar at hóma, men enn er langt á mál. Vesturheimurin hevur her eina stóra moralska ábyrgd og vónandi fara ríku londini at liva upp til hesa ábyrgd.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bangnir polittikarar

**Hans David Nielsen**
*Sørvágur*

Vit hava bæði sæð og hoyrt tað so mangan fyrr, hettar her at okkara fólkavaldu ikki tora at taka eina rætta avgerð tá trýst kemur á teir.

Nú hendan antidiskrimineringslógin ella hvat man nú einaferð skæl kalla tað, er so frammarlaga í kjakinum, so sita nógvir av okkara fólkavaldu og skattasúgvarum og venda høvdið burtur, alt meðan teir eru skorreyðir í fjesinum, ikki av illsinni men av ótta fyri, hvat lagnan hjá teimun verður til næsta val, og um teir fáa 4 ár meira til at súgva lummarnar hjá tí einstaka skattgjaldaranum, ella um ein uppøst kristilig samkoma fer at forkoma teimum hesa góðu inntøku.

Nú diskrimineringslógin kom á tingborð, og ikki sýnist at blíva samtykt í tinginum, munnu mong hugsa aftur á kanningina, sum ein av fjølmiðlunum gjørdi fyri ikki so langari tíð síðan, har hvør einstakur tingmaður varð spurdur, hvat hann hevði atkvøtt, um lógin kom á tingborð, og minnast vit øll, at lógin tá hevði komið spælandi ígjøgnum í tinginum. Men nú álvara skal vera í, hvønn knapp trýstast skal á, stinga summir høvdið í sandin og tora ikki at standa við tað, sum teir søgdu við fjølmiðlarnar fyri kortum.

Allarhelst er sperðil komin í, tí hesir polittikkarar eru bebbaræddir fyri fólksins dómi til næsta val, eru helst hóttir av andaligum fanatikarum, at taka teir ikki annað skinn um bak ja so ríkur ein trygg inntøka av sveittandi skattapengum hjá millum annað teimum samkyndu, sum jú eru líka fyri lógini, tá tað ræður um at at rinda skatt. Haldi annars at tey samkyndu burdu fingið ein slags frádrátt í inntøkuni, tí tey spara land og kommunur fyri hópin av útreiðslum fyri millumannað barnagarðspláss, sum jú ikki hanga á trøunum í hesum døgum.

Eg dugi ikki í mínum villasta fantasi at síggja, hví uppskoti já Finni og Anitu er so ringt at taka undir við hjá tingfólki. Tað snýr seg jú bara um at verja ein minnilutabólk frá at vera úthongdur og niðurgjørdur av millum annað ávísum tingmonnum. Tað skuldi ikki veri so ringt at svølgt, tingmenn eru jú sjálvir vardir av bæði einum og øðrum, so tað er ikki lukkuligt at traðka teir ov fast á tærnar. Ja, sjálvt løgregluna kunnu teir biðja ríða og reisa, um hon skuldi komið á gátt.

Tosað hevur verið nógv um at liva rætt og at liva eftir tí, sum várharra vil hava okkum at gera og ikki gera, og ofta hevur Bíblian verið brúkt at duka fólk í høvdið við, tá tey av eini ella aðrari orsøk ikki passa inn í tað samfelag, sum ávísir andaligir bólkar halda seg hava fingið sum gávu frá skaparanum.

Eg haldi, at hesi, sum eru kristin, skuldu heldur apað seg meir eftir høvuspersóninum í Bíbliuni, tí hann var ikki nakað haturfult ella dømandi menniskja, tá hann gekk her á foldum fyri góðum 2000 árum síðani. Hann tók øll fólk til sín, óansæð um tey vóru samkynd, drankarar ella skøkjur fyri tann sak skuld. Øll skuldu hava loyvi at liva, og øll vóru vælkomin at fylgjast við honum, har var ikki gjørdur mannamunur á nøkrum.

Til seinast fari eg inniliga at heita á tey, sum velja hesar bangnu og følsku profetar inn á ting, um at hugsa seg væl um til næsta val, og heldur velja menn og kvinnur inn á ting, sum tora at standa við tað, sum tey siga uttan fyri tingsins gátt, og ikki velja vattnissur sum bara hugsa un atkvøður og ta feitu lønina, sum tey heysta hvønn mánað.

# Ræðst ikki tungutalu - Steinbjørn!

**Jenis av Rana**



*Lat meg sleppa at berjast* - soleiðis ljóðar yvirskriftin til hugleiðingar, sum skyldmaðurin og rithøvundin Steinbjørn B. Jacobsen ber fram í Dimmu leygardagin. Har viðger hann m. a. ymiskar støðutakanir til homosexualitet, Bíbliulesan og tungutalu.

Millum annað nevnur hann bíbliukøn fólk, ið meta, at Bíblian ongantíð skuldi verið deild sundur í vers - og síðani viðger hann tungutalu. Hann greiðir frá lestri sínum av fyrra Korintbrævi kap. 14., og bráddliga velur høvundin eitt ørindi burturúr mongum, ið Paulus skrivar um hesa náðigávu Andans. Orðarætt skrivar hann:

*… jú, Paulus umtalar sanniliga tungutalu, hann fordømir tað ikki, helst tí at fleiri í Korint brúktu henda sið í teirra heidnu gudsdyrkan, men hann sigur eisini í sama brævi, at hann heldur vil tala fimm orð við skili sínum enn tíggju túsund orð í tungu.*

Lat niðurstøða Steinbjørns um heidnu guðsdyrkan Korintmanna fara, men fyri rættleikans skuld loyvi eg mær at endurgeva onnur ørindi úr sama kapitli, sum vísa okkum greiðu hugsan Paulusar um tungutalu og hvønn týdning hendan hevði fyri hann. Vit lesa:

*… tann, sum talar í tungum, uppbyggir seg sjálvan..*

*… eg vildi væl, at tit allir talaðu í tungum, men fyrr, at tit profeteraðu.*

*… eg takki Gudi - eg tali meiri í tungum enn tit allir..*

*… tá ið tit koma saman, hevur hvør tykkara sítt: Sálm, læru, opinbering, <u>tungutalu</u>, útlegging - latið alt vera til uppbygging!*

*… nú, brøður mínir, tráið tá eftir at profetera, og <u>forðið ongum at tala í tungum!</u>*

Lat meg bert leggja afturat, at ikki bert eg, men óivað øll, sum kenna til at tala í tungum, munnu skilja, hví Paulus takkar Gudi fyri, at honum untist at tosa "meira í tungum enn teir allir".

p.s.
Til umhugsunnar viðvíkjandi tí at taka einstøk ørindi burtur úr heildini. Tá Jesus í synagoguni í Nazaret endurgav úr bók Esajasar kap. 61, tá steðgaði Meistarin mitt í ørindi 2!, legði bókina saman og flutti fram røðu sína.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.